# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



Mamma okkara:

## Kathrina Olsen, Klaksvík, farin

Mamma okkara, Kathrina, varð borin í heim hin 12. juni 1924. Foreldur hennara vóru Birgithe (fødd Mikkelsen úr Barbustovu í Syðrugøtu) og Samuel Jacob Thomsen við Gil í Norðagøtu.

Omma og abbi fingu seks børn – tríggjar gentur og tríggjar dreingir. Tá ið tey vórðu vaksin, búsettust øll aðrar staðir, so húsini hjá ommu og abba í Gøtu vórðu seld.

Nú er bara yngsta systirin, Judith, sum býr á Strondum, eftir á lívi. Mamma og Judith sóust ikki so ofta, men tær høvdu javnan drúgvar samrøður í telefonini.

Mamma fortaldi mangan ymiskt frá sínum barna og ungdómsdøgum í Gøtu, og har upplivdi hon eisini at vera bæði til neytar og í torvi.

Sum ung genta kom mamma til Klaksvíkar til mostur sína, Sannu á Hædd, og hon "passaði hana upp", sum tey søgdu, tá ið hon fekk Minnu. Hon var eisini hjá systkinabarninum, Onnu úr Mikladali, tá ið hon fekk Elinborg.

Eisini arbeiddi mamma í fiski í Gøtu, og hon arbeiddi í eini klædnaverksmiðju, sum danir høvdu í Gøtu, sum æt "Trifa".

Mamma tænti hjá Ragnu og Petur Sofusi Hansen í Havn og í Klaksvík hjá Gerdu og Evaldi Kjølbro.

Meðan mamma var í Klaksvík, kom hon at kenna pápa, ið vanliga varð nevndur Jakku á Dalinum, og sum doyði fyri tveimum árum síðani.

Tey bæði giftust og fluttu inn í nýggju húsini í Uppsølum. Mamma og pápi vóru góð hjún og stuðlaðu hvørt øðrum í øllum.

Tey fingu trý børn og fimm ommu- og abbabørn, sum tey vóru sera góð við.

Mamma helt so fast um tað gamla og dugdi illa at venja seg við familjumynstrið og kynsbýtið nú á døgum. Hon helt tað avgjørt vera best, um tað bar til, at tað var maðurin, ið var úti í lønandi vinni og konan, sum tók sær av húsi og heimi – í øllum førum meðan børnini vóru smá.

Hon helt tað vera spell, at ungar gentur ikki longur fóru út at tæna. Hon bar ymiskt víðari, ið hon lærdi, tá ið hon tænti, eitt nú, at vit ikki skuldu skrambla við steintoynum, tá ið vit vaskaðu upp, og at vit, tá ið vit bakaðu og tílíkt, skuldu beina tilfar og íløt burtur so hvørt, sum vit høvdu havt hetta á hondum.

Tað dugdi mamma. Tað var altíð ruddiligt rundanum hana, tá ið hon arbeiddi.

Mamma átti altíð okkurt heimabakað afturvið einum drekkamunni. Fyrr bant hon nógv. Vanligt var, at vit fingu nýggja troyggju, tá ið eitt nýtt skúlaár byrjaði. Mamma plagdi eisini at klippa okkum øllum.

Fyrr var vanligt, at øll seingjarklæði og undirklæði vóru hvít. Hetta varð sett á blot, kókað í kókigrýtu og so vaskað. Mamma sá eina æru í at hava snjóhvítt toy á snórinum, og enn fekk alt hvítt toy somu viðferð, hóast hon hevði nýmótans vaskimaskinu.

Hon hugsaði ikki um, hvat var skjótast og lættast. Hjá henni ráddi um at gera alt á besta hátt og fáa gott úrslit, um tað so var meiri stríð, so hevði tað einki at týða.

Væl dámdi mammu at fáast við urtapottar, og hon fekk alt at vaksa. Hon frøddist um hvørja blómu, og nú, mamma er farin, standa urtapottarnir í stovunum í besta blóma og í alskyns litum.

Nógvar gávur hava vit fingið frá mammu. Hon var gávumild og stórtøkin, men í gerandisdegnum var hon ansin og oyðslaði ikki. Einki varð tveitt burtur, ið nytta kundi fáast av.

Mamma helt seg hava eitt týðandi starv sum húsmóðir,



kona og mamma, og hetta starv tók hon í stórsta álvara. Hon helt húsið reint og snøgt, gjørdi mat, vaskaði klæði og hjúklaði um familjuna og gjørdi alt so heimligt og fjálgt. Mamma var miðpunktið og tryggleikin í okkara heimi.

Mamma var næstan altíð inni. Hon var heimkær og innisæl. Mangan var hugnaligt at koma aftur úr skúla í illveðri og kavaroki, tí tá hevði mamma ofta pannukøkur, kakao, bollar ella okkurt annað gott til okkum.

Tá ið vit vóru smábørn, fluttu omma, abbi og Petur, mammubeiggi, ið var ógiftur, úr Gøtu og inn til okkum at búgva, og har búðu tey so leingi, sum tey livdu. Í fleiri ár vóru vit átta fólk í húsi, og mamma hevði nógv at gera.

Omma, abbi og Petur kendu seg væl hjá okkum, og tey vóru óført at hjálpa til við ymiskum, ið gerast skuldi, bæði inni og úti.

Abbi var birgur til tað seinasta, og hann gjørdi nógvar ferðir yvir aftur til Gøtu, men omma hevði ikki góða heilsu og gjørdist at enda óhjálpin, og tá tók mamma sær væl av henni.

Petur, mammubeiggi, var einans seinast í 50´unum, tá ið hann fekk heilabløðing, og høgra lið varð lammað, so hann hevði hjálp fyri neyðini, og mamma passaði hann.

Seinastu árini, pápi livdi, var hann ússaligur. Mamma var um hann. Hon royndi øll heimaráð og alt, ið hugsast kundi, fyri at pápi skuldi styrkna og hava tað betur.

Fyri einum ári síðani fekk mamma blóðtøpp og varð tvær ferðir seinni innløgd við vatni á lungunum, men hon vann seg væl aftur hvørja ferð.

Fyrstu tíðina aftaná búði hon hjá Berghild, systir míni, og tá ið hon fór inn aftur til sín sjálvs, skiftust vit at sova hjá henni, men tað var skjótt, so helt mamma hetta vera óneyðugt, og hon svav aftur einsamøll.

Tað vóru ójavnir dagar, men mamma bakaði og vaskaði við sama lag, men tað tók longri tíð enn áður, tí hon noyddist hvíla inn ímillum, og nú hon sá, at fólk vóru farin at hoyggja, segði hon, hvussu góðan hug hon hevði at fara oman í bøin at heingja uppí eitt turkilag.

Skal eg lýsa mammu, so var hon sterk og røsk bæði likamliga og sálarliga. Mamma var umhugsin, vælgerin og dugdi væl at leggja arbeiðið til rættis. Hon livdi fyri at hjálpa øðrum, spardi ikki seg sjálva, og hon kravdi ikki nógv av lívinum. Hon hevði sterkan lívsvilja og góðan arbeiðshug til tað seinasta.

Eg var saman við mammu so at siga hvønn einasta dag. Næstan hvørt kvøld sótu vit og prátaðu leingi, til songartíð varð. Eisini kvøldið fyri, sum hon doyði. Mammu dámdi væl, at vit prátaðu og hugnaðu okkum. Hon var prátrík, glað, løtt og fylgdi við í nógvum. Eg hugsaði ikki um, at hon var ein gomul kona, tí mangan helt eg hana vera raskari enn eg.

Mamma var sera takksom fyri lívið og fyri, at hon hevði havt so góða heilsu og havt møguleika at passa foreldur, beiggja og mann, so at tey høvdu tað trygt og gott heima til tað seinasta, og at tað ikki var neyðugt, at tey fóru á nakað heim, sum teimum ikki hevði dámt.

Hon var takksom og nøgd. Nú, hon var gomul, gleddist hon hvønn dag um, at hon livdi so mikið væl og kundi verða í sínum egnu húsum.

Mikumorgunin, hin 11. august, ringdi mamma eftir mær um 10 tíðina, tí hon kendi seg ikki væl.

Hon var bleik, ússalig og hevði vaml. Av tí at støðan líktist henni, tá ið hon hevði blóðtøpp, helt eg best vera, at hon kom á sjúkrahúsið. Mamma gjørdi ikki stórvegis mótstøðu, so mær varð greitt, at hon var illa fyri.

Mamma kom á sjúkrahúsið og hevði fingið blóðtøpp. Um 6 tíðina hetta sama kvøld, meðan vit hildu í hondum hennara, sovnaði hon burtur, 86 ára gomul.

Svárt er at missa mammu sína, og tungt er at síggja húsini standa tóm – hetta vakra heimið, sum pápi, við sínum kønu hondum, bygdi og innrættaði, og sum mamma prýddi og hugnaði.

Við takksemi goyma vit rík minni um okkara kæra heim og okkara góðu og trúføstu foreldur.

Mamma legði lív sítt í Harrans hond og hevði ofta Guds orð á munni. Henni dámdi serstakliga væl ein danskan sang, sum hon ynskti, at vit skuldu syngja til jarðarferðina, og varð hann tá sungin á føroyskum. Fyrsta ørindi ljóðar so:

*Hvilken lykke det skal blive,*
*når Guds børn må komme hjem.*
*Ingen kan den fryd beskrive,*
*som i himlen venter dem.*

Ærað verið minnið um mammu.

**Betta**

## TØKK

Ein hjartans tøkk til tey, sum hjálptu og tóku lut í minningargudstænastu í Kollafjarðar Kirkju yvir

**Jytte Mikkelsen**
**fødd Jensen**

*Familjunar vegna*
***Anfinn Mikkelsen***



## 25 ára starvsdag

Mikudagin 1. september hevur **Hjalmar Norðberg Poulsen, Vestmanna,** arbeitt sum maskinmeistari í elfelagnum SEV í 25 ár.

## Merkisdagur

**80 ára føðingardagur**
Mikudagin 1. september fyllir Liss Rasmussen í Runavík 80 ár. Føðingardagurin verður hildin í Sjókafeini í Runavík, og tey, ið vilja heilsa uppá Liss, eru vælkomin frá kl. 17 til kl. 20.